LM-106/2020

Fylgiskjal 5

Umhvørvis- og Vinnumálaráðið
Gongin 7
Postboks 377
110 Tórshavn

Tórshavn, tann 22. desember 2020

Viðv. Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um góðkendar grannskoðarar og grannskoðanarvirkir

Hervið senda vit okkara viðmerkingar til omanfyri nevnda lógaruppskot.

Yvirskipað taka vit undir við at lógin verður dagført, herundir serliga at eftirlitið framyvir verður skipað sum eitt "risikobaserað" eftirlit. Vit hava tó einstakar viðmerkingar, sum greitt verður frá niðanfyri.

Viðv. firmarotatión
Á síðu 21 í viðmerkingunum til at seta í gildi ES-fyriskipan er gjørd ein talva, sum greiðir frá innihaldinum í skiftisreglunum í grein 6. Vit hava samanborið hesa við skiftisreglurnar í Danmark. Tað framgongur fylgjandi í talvuni um kundar, har grannskoðari hevur sitið í minni enn 11 ár:

"Fer frá 1. juli 2021, um 10 ár eru runnin, men kann grannskoða ársroknskapin fyri 2021 lidnan (kann tó leingja við 10/14 árum - um útboð/joint audit)"

Hetta tykist vera ein munandi herðing í mun til líknandi skiftisreglur í Danmark. Vit vilja í hesum sambandi vísa til talvuna niðanfyri úr Revision & Regnskabsvæsen, nr. 8 frá august 2016, har samanberiliga reglan er "18. juni 2006 og frem". Samsvarandi donsku skiftisreglurnar vóru krav um útboð eftir 10 ár og krav um frával eftir 20 ár, um grannskoðaravirki hevði verið valt í minni enn 11 ár. Orðingin "*Fer frá 1. juli 2021, um 10 ár eru runnin*" í viðmerkingunum kann tískil ikki vera rætt.

TABEL 2: OVERGANGSREGLER FOR FIRMAROTATION.

Revisionsfirma valgt 1. gang (perioder, hvor selskabet IKKE var et PIE-selskab tæller ikke med)	Krav om udbud	Krav om fratrædelse (kun regnet på 1 revisor)
Inden 16. juni 1994		17. juni 2020
17. juni 2014 - 16. juni 2003		17. juni 2023
17. juni 2003 – 16. juni 2006	17. juni 2016	17. juni 2026
18. juni 2006 og frem	+ 10 år	+ 20 år

Kilde: Egen tilvirkning

Talvan á síðu 21 í viðmerkingunum nevnir einki um reglurnar um útboð og ávirkanina, sum hetta kann hava á skiftistíðina.

Annars skulu vit upplýsa, at full semja er ikki í felagnum um rotatiónsreglurnar, og at tað tí má væntast, at einstøk virki fara at koma við sínum egna hoyringssvari.

Viðv. herdum revsireglum
Í viðmerkingunum til grein 42 í lógini um góðkendar grannskoðarar og grannskoðanarvirkir framgongur, at mett verður at verandi bøtur á 300 tkr. til einstakar grannskoðarar og 750 tkr. til grannskoðanarvirki verða mettar hóskandi. Hóast hetta leggur uppskotið upp til, at hægst loyvdu bøtur verða tvífaldaðar, soleiðis at hesar verða 600 tkr. til einstakar grannskoðarar og 1.500 tkr. til grannskoðanarvirki.

Felagið vil í hesum sambandi vísa á, at støði á bótunum svarar til galdandi ásetingar í Danmark og harvið er ásett út frá donskum viðurskiftum. Støðið á 1.500 tkr. er ætlað at raka donsk grannskoðanarvirki við upp til 2.000 starvsfólkum og milliarda-umsetningini. Til dømis kann nevnast, at altjóða grannskoaðnarvirki PwC hevði eina sølu í Danmark upp á 3,2 milliardir í roknskaparárinum 2019/20. Í mun til føroysku grannskoðanarvinnuna vilja vit vísa á, at største fyritøkan í Føroyum til samanberingar hevur 36 starsvsfólk.

Fleiri hoyringspartar gjørdu í viðgerðini av donsku lógarbroytingini í 2015 vart við, at støðið varð mett høgt sett í mun til donsk viðurskifti. Um støðið kann sigast at vera høgt sett í mun til donsk viðurskifti, so er tað okkara greiða meting, at støddin á bótum als ikki stendur mát við føroysk viðurskifti.

Herðingin kann hugsast at føra við sær víðfevndar avleiðingar fyri føroysku grannskoðanarvinnuna, herundir fyri møguleikan hjá vinnuni at draga at sær nýggjar grannskoðarar og fyri tryggingarkostnaðin hjá grannskoðarum og virkjum.

Viðv. broyting í samansetingini av eftirlitinum
Vit taka undir við uppskotinum til skipan av eftirlitinum, herundir at Grannskoðanareftirlitið verður varðveitt við tí fyri eyga at varðveita fakliga støði, ið er bygt upp árini, ið eftirlitið hevur virkað.

Grein 41 ásetir, at eitt av umboðunum fyri roknskaparbrúkaran skal hava "leiðsluroyndir" frá PIE fyritøkum. Tað framgongur ikki í uppskotinum hvat orðið "leiðsluroyndir" merkir. Vísast skal á at bert eitt avmarkað tal av persónum í Føroyum hava royndir sum stjórar og/ella nevndarlimir í PIE fyritøkum. Hinvegin er skarin av fólki nakað størri, um orðingin eisini fevnir um leiðsluroyndir undir ovastu dagligu leiðsluni, so sum CFO, internur grannskoðanarleiðari og líknandi.

Eisini kann hugsast, at leiðsluroyndir frá størri fyritøkum í Føroyum kunnu vera eins viðkomandi, hóast talan ikki er um PIE fyritøkur.

Eru spurningar ella ivamál, eru tit sjálvandi altíð vælkomin at seta tykkum í samband við okkum.

Við heilsan

Felagið Føroyskir Grannskoðarar

Jóhannes Færø	Olaf Frits Joensen	Heini Thomsen	Mark T. Højgaard
Formaður	næstformaður	peningarøkil	skrivari